

Grampian Talisman við oljukeiina í Havn mánadagin. Mynd Jens K Vang

# Eitt útlendskt frálandsskip hvørja viku í ár

Deil:

**Jan Müller**

25.02.2015 - 12:19

Oljan.fo

Tey blíva við at koma - útlendsku frálandsskipini - til Føroya at skifta manning og proviantera. Mánadagin kom so sjeynda fremmanda veitingarskipið í oljuvinnuni á Havnina í ár. Steðgurin var sum vera man stuttur. Manningarskifti og so keyp av provianti. Síðani aftur á oljuleiðirnar eystan fyri markið, har veitingarskipini arbeiða fyri fleiri av heimsins størstu oljufeløgum. Aftur hesaferð var Faroeship umboð fyri skipið. Hetta

seinasta var Grampian Talisman, sum kom eina viku eftir enn eitt skip frá sama reiðaríi, Grampian Conquest.

